# Pensjónsrøkt

BANKNORDIK

**Pensjónsrøkt**

Við Pensjónsrøkt kann BankNordik bjóða eina dygdargóða tænastu, ið støðugt røktar tína pensjónssamansparing. Tú fært fyrimunin av at hava tína egnu persónligu goymslu, samstundis við at serfrøðingar úr bankanum røkta tíni virðisbrøv.

Royndir vísa, at íløgur í eina samanseting av partabrøvum og lánsbrøvum í longdini geva størst avkast samanborið við at hava peningin standandi í bankanum. Við Pensjónsrøkt fært tú fyrimunirnar av at seta tína samansparing í virðisbrøv, uttan at tær nýtist at fylgja við á virðisbrævamarknaðinum. Serfrøðingarnir í bankanum syrgja fyri at gera íløgurnar við støði í tínum persónliga íløguprofili, men tú hevur altíð yvirlit yvir, júst hvørji virðisbrøv tú eigur.

**Hvør kann fáa Pensjónsrøkt?**
Øll, ið hava eina pensjónssamansparing, kunnu gera eina avtalu um Pensjónsrøkt.

**Soleiðis virkar Pensjónsrøkt**
Saman við tær finna vit tín íløguprofil, sum tekur støði í tínum váðafýsni, aldri og pensjónsaldri, og við støði í íløguprofilinum verður tín pensjónssamansparing sett í virðisbrøv. Tín ráðgevi kennir tíni fíggjarviðurskifti, og tín pensjónspakki verður settur saman, soleiðis at hann hóskar júst til tín.

BankNordik fær fulltrú til at røkta íløgurnar innanfyri karmarnar í avtaluni, soleiðis at vit kunnu seta tína pensjónssamansparing júst har, sum vit meta, at tað loysir seg best í mun til tín íløguprofil. Serfrøðingarnir í bankanum hava støðugt eftirlit við tínum íløgum.

Niðanfyri er ein íløguætlan fyri Pensjónsrøkt í mun til valdan váða.

| Prosent | Váði: Lágur | Váði: Miðal | Váði: Høgur |
| --- | --- | --- | --- |
| Partabrøv | 20 | 50 | 80 |
| Lánsbrøv | 80 | 50 | 20 |

BankNordik

Telefon 330 330
Telefaks 316 950
www.banknordik.fo

Fyri pensjónir inngoldnar eftir 2014 broytist íløguparturin, tá ið kundin nærkast pensjónsaldri. Niðanfyri er ein íløguætlan fyri Pensjónsrøkt av pensjónum, sum eru inngoldnar eftir 1. januar 2014 og kundin er 60 ár ella eldri.

| Prosent | Váði: Lágur | Váði: Miðal | Váði: Høgur |
|---|---|---|---|
| Partabrøv | 20 | 40 | 60 |
| Lánsbrøv | 80 | 60 | 40 |

Tá vit handla, senda vit tær altíð eina handilsnotu, og um tú t.d. vil hava at vita, hvørjar hugsanir eru handan umleggingar í tíni goymslu, kanst tú altíð spyrja á tíni deild ella lesa um umleggingarnar á www.banknordik.fo. Sjálvt um umsitingin av tíni pensjónssamansparing er løgd í hendurnar á BankNordik, kanst tú framhaldandi fylgja við í gongdini. Tað gevur tær tryggleika og gjøgnumskygni.

Í Netbankanum kanst tú fáa yvirliti yvir, hvussu virðisbrøvini í tíni goymslu hava klárað seg. Harumframt fært tú hálvárligar avkastfrágreiðingar, sum lætt og greitt geva tær yvirlit yvir avkastið, sum tínar íløgur hava givið.

**Váðamerking frá Fíggjareftirlitinum**
Fíggjareftirlitið hevur ásett reglur um váðamerking av íløgum, har íløgurnar verða býttar upp í grønar, gular og reyðar bólkar. Tú kanst fáa meira kunning um váðamerking á www.banknordik.fo/ilogur.

**Alment um íløgur**
At gera íløgur er altíð knýtt at einum ávísum váða fyri, at væntanirnar til framtíðar gongdina ikki vísa seg at halda. Íløgur í virðisbrøv kunnu føra til eitt tap treytað av kursbroytingunum, og íleggjari hevur sjávur ábyrgdina fyri hesum váða.